# Hydro-Tech flytir



*Hydro-Tech fer at flyta úr smiðjubygninginum fremst á myndini í stóra bygningin longst burtur*

*Mynd: Edvard Joensen*

**Hydro-Tech savnar alt virksemið á Eiði undir sama tak í nýggja smiðjubygninginum á havnarlagnum. Gamli smiðjubygningurin verður væntandi seldur fyrsta dagin**

VINNUMÁL

*Edvard Joensen*

**Eiði:** Gamli smiðjubygningurin hjá Hydro-Tech á Eiði verður helst seldur ein av komandi døgunum. Samráðingarnar eru komnar væl áleiðis, og smiðjan fer at flyta alt virksemið í nýggja bygningin á havnarlagnum.

Tann nýggi smiðjubygningurin er rættiliga nógv størri enn tann gamli, og klárar at hýsa øllum virkseminum hjá smiðjuni, sigur Ólavur Asafsson Olsen, stjóri á Hyrdo-Tech.

Í gamla bygninginum er einki virksemi hjá Hydro-Tech sum so, annað enn at skrivstovuhøli og matarhøli eru eftir. Tá so tað alt er flutt í nýggja bygningin, verður arbeiðsligari hjá teimum, væntar stjórin.

Partur av gomlu smiðjuni verður leigaður út. Talan er um ein skipstimburmann, sum millum annað plagar at gera timburarbeiðið í teimum tvíkiljunum, sum Hydro-Tech smíðar á Eiði, skilir Sosialurin.

Enn er eingin endaligur sølusáttmáli undirskrivaður, og tí vilja partarnir, sum samráðast um handilin, ikki siga nakað meira um sjálvan handilin.

Sosialurin skilir, at talan er um ein privatpersón, sum liggur framvið at keypa smiðjubygningin. Hann vil tó ikki siga nakað enn, tí sum viðkomandi sigur, er eingin handil avsluttaður.

Men hinvegin noktar hann ikki fyri, at hann er áhugaður í at keypa smiðjuna. Hann hevur tilknýti til ávísa vinnu á Eiði og metir, at hølini eru egnað at brúka í tí sambandi. Har eru bæði goymslupláss eins og skrivstovuhølini eru innrættað.

Møguligi keyparin sigur við Sosialin, at onkur fyrispurningur hevur longu verið um at sleppa at leiga seg inn í smiðjubygningin. men enn er eingin avgerð tikin um tað. Tó metir hann góðar møguleikar vera fyri, at verandi leigumál kunnu fara at halda fram.

Hydro-Tech fer kortini at verða verandi í gamla smiðjubygninginum fram til fyrsta mai, tí ikki fyrr enn tá vænta teir, at alt er klárt i nýggja bygninginum at taka í móti tí, sum eftir er at flyta.

# Eldur í sørvágsbáti

**Mándagin fekk ein útróðrarbátur úr Sørvági stóran skaða av eldi. Báturin lá í bátahylinum, og eingin mansskaði hendi**

ELDUR

*Edvard Joensen*

**Sørvági:** Glastrevjabáturin Dunga Hans úr Sørvági fekk stóran skaða, tá eldur var í stýrihúsinum. Eingin mansskaði stóðst av eldinum.

Mánadagin kom eldur í ein glastrevjabát, sum lá í bátahylinum í Sørvági. Innan úr stýrihúsinum er alt farið fyri einki. Øll tólini mugu skiftast út, eins og garneringin øll má gerast av nýggjum. Helst verður eisini neyðugt at skifta allar rútarnar. Ein rútur í bakborði, har eldurin var, er brotin. Sprongdur av hita.

Tað stendur ein fiskakassi á bryggjuni. Har eru radari, GPS'ari, ekkolodd og onnur tól í, sum tikin eru úr Dunga Hansi. Eisini eru brendir akkumulatorar og onnur útgerð at síggja.

– Eitt óluksáligt skil at liggja her avbrendur, meðan fiskurin svimur upp á land.

Jógvan Falkvard í Sørvági, sum eigur Dunga Hans, er í ringum skørum, av at tað skuldi ganga so illa nú beint upp undir várróðurin.

Hann stendur hálvur undan lastalúkuni á glastrevjabáti sínum. Er farin at rudda eftir eldin. Báturin skal gerast aftur, eru hann og tryggingin vorðin samd um.

Men tað verður ein strika í rokningini kortini, tí tað fer ov nógv tíð, heldur Jógvan.

Tað var eitt skammlop í elskipanini, sum gjørdi, at eldur kom í, greiðir hann frá.

Hann sigur, at hann hevði verið í bátinum, stutt áðrenn hann fekk boð um eldin. Tá hann lat hurðina upp, vaks eldurin knappliga, tí luft slapp til. Hann hevði eina vatnslangu úr landi í hondini, og við henni fekk hann sløkt eldin, áðrenn sløkkiliðið a flogvøllinum, sum eisini var boðsent, kom á staðið. Eldsløkkjarin var inni í húsinum, og har var ikki komandi at fyri hita.

Tað verður ein rímiliga dýrur umgangur eisini, vísir hann á. Gamaní fer tryggingin at gjalda, men einastaðni oman fyri hálvtannaðhundratúsund krónur væntar hann, at skaðin fer at kosta.

– Og so koma teir nú og siga mær, at um eg hevði havt eina ella aðra trygging - eg minnist ikki, hvat hon eitur - so hevði eg krav upp á at fáa annan bát, meðan eg bíði eftir, at hesin verður afturgjørdur. Hví segði eingin mær tað, tá eg teknaði hesa tryggingina? fýlist Jógvan Falkvard á.

Ikki tí. Hann fer neyvan at ganga hendur i lumma kortini, tí longu nú hevur hann fingið annan bát, sum liggur i Sørvági, í boði, og hann væntar, at hann fer at taka av.

Hóast Jógvan ikki er nakar ársungi, hann er komin til pensiónsaldur, ætlar hann ikki at leggja seg á landi kortini.

– Eg havi ikki tíð at leggja meg at doyggja, meðan fiskaprísurin er so høgur, heldur hann.



*Stýrihúsið fór illa innan av eldinum*

*Mynd: Edvard Joensen*



*Øll nautiska útgerðin er kasserað, og nýggj má setast íaftur*

*Mynd: Edvard Joensen*



Sjónvarpið ger portrett av Hans Birgir Hansen:

# – Nú koma øll at kenna meg



*– Tá ið ein kvinna úr Sjónvarpinum ringdi, helt eg, at tað var tí, at eg ikki hevði goldið sjónvarpsgjaldið, men soleiðis var tað ikki. Hon segði, at hon vildi sleppa at gera eina sjónvarpssending um meg, greiðir Hans Birgir Hansen frá*

*Mynd: Jens Kristian Vang*

**– Eri eg ikki kendur sum er, so koma fólk at kenna meg aftaná hesa sendingina, sigur Hans Birgir Hansen, býarmynd í Havn. Hann skal tosa, syngja, dansa og undirhalda í eini portrettsending, sum Sjónvarp Føroya tekur upp í løtuni**

SJÓNVARP

*Eyðun Klakstein*

Hans Birgir Hansen verður í næsta mánaði høvuðsleikari í nýggjari sending, sum Sjónvarp Føroyar er í holt við at framleiða.

Hans Birgir er býarmynd í Havn, men nú fáa allir føroyingar høvi at uppliva og hoyra hann. Hann fer at siga sína hugsan um lív sítt, hann fer at syngja og dansa, og hann fer at taka hyggjaran við inn í gerandisdag sín við sínum egna lítla sjónvarpskamera.

– Eri eg ikki kendur sum er, so koma fólk at kenna meg aftaná hesa sendingina, heldur Hans Birgir Hansen.

Hann hevur seinastu tíðina havt eitt lítið sjónvarpskamera hjá sær alla staðir, sum hann hevur verið, og Sjónvarpið hevur eisini gjørt nógvar upptøkur av honum.

## Helt tað snúði seg um sjónvarpsgjaldið

Alt byrjaði mánadagin í næstusíðstu viku, tá Sjónvarpið ringdi til hansara.

– Tá ið ein kvinna úr Sjónvarpinum ringdi, helt eg, at tað var tí, at eg ikki hevði goldið sjónvarpsgjaldið, men soleiðis var tað ikki. Hon segði, at hon vildi sleppa at gera eina sjónvarpssending um meg, greiðir Hans Birgir frá.

Tað var Hans Birgir fúsur til beinanvegin, og síðani hevur hann lagt nógva orku í at fáa góðar upptøkur til sjónvarpið. Hann hevur havt eitt lítið kamera hjá sær, og hann hevur við hesum tikið myndir, har sum hann vanliga ferðast í høvuðsstaðnum.

Harafturat hevur Sjónvarpið eisini tikið upp av Hans Birgiri á teimum støðum, har hann brúka stóran part av síni tíð.

– Hendan sendingin skal vera livandi og undirhaldandi, og hon skal vísa ein Hans Birgir, sum tosar, syngur, dansar og undirheldur, sigur høvuðsleikarin sjálvur.

– Hetta er nakað nýtt fyri meg, og tí havi eg verið eitt sindur nervøsur og spentur, men tað skal eg vera. Upptøkurnar skulu vera so ektaðar og natúrligar sum gjørligt, sigur hann.

## Sleppur at siga sína hugsan

Tað er nýggja kvinnan í Sjónvarpi Føroya, Barbara Samuelsen, sum stendur fyri hesi sendingini.

– Hetta verður ein hálvur tími um eina býarmynd í Havn. Øll í høvuðsstaðnum kenna Hans Birgir, og helst eisini nógv fólk kring landið. Tað slepst ikki undan, at nøkur fólk halda hann verða ein serskølt, men nú lata vit hann sleppa fram at í sjónvarpinum at greiða frá sínum hugsanum og tosa um lívið hjá sær, sigur Barbara Samuelsen.

– Vit fylgja honum í gerandisdegnum kring um í Havnini, har hann vanliga kemur. Hann hevur verið sera góður at samstarva við. Hann er í góðum lag og íðin eftir at fáa sum mest burturúr.

Sendingin um Hans Birgir Hansen verður hálvan tíma til longdar, og hon skal sendast í SvF seint í februar mánaði.

Hans Birgir dámar væl at syngja, og kanska fer hann nú at syngja ein væl kendan countrysang í komandi tíð.

They're gonna put me in the movies, they´re gonna make a big star out of me... and all I gotta do is act natural.


HYGG HER

CITROËN Mercedes-Benz MITSUBISHI

Ivan Johansen Bilar

www.ivan.fo

Brúktir bilar til sølu

Citroen AX 1,4 GT
km. 115.000, árg. apr. 1989
17.000,-

Citroen Xantia 1,9 TD
km. 94.000, árg. okt. 1996
115.000,-

Citroen Xantia 1,9 TD 5H
km. 101.000, árg. jun. 1998
135.000,-

Citroen Xsara 1,6i STC 5H
km. 40.000, árg. jan. 1999
125.000,-

Fiat Tipo 5H
km. 108.500, árg. mai 1989
26.000,-

Ford Escort 1,6i 16V
km. 80.000, árg. jun. 1997
70.000,-

Ford Escort 1,8D GLX 4H
km. 187.000, árg. nov. 1995
Sýnaður 06'01 51.000,-

Ford Escort 2,0TD CLX stc. vøruvognur
km. 128.000, árg. mai 1997
v/mvg 60.000,-

Hyundai Accent 1,6LS
km. 65.000, árg. feb. 1999
75.000,-

Mazda 626 2,0 TD STC. 5H
km. 67.000, árg. mai 1999
165.000,-

Mazda E2200 Vøruvognur
km. 91.500, árg. mar. 1997
v/mvg Sýnaður 06'01 95.000,-

Mitsubishi L300 2,5TD Cosmos Van
km. 112.000, árg. mar. 1996
v/mvg 120.000,-

Mitsubishi Galant 2,0 GTi 5H
km. 180.000, árg. feb. 1992
Sýnaður 09'01 65.000,-

Mitsubishi Lancer 1,5 GLXi 5h
km. 145.000, árg. mai 1992
Sýnaður 12'01 52.000,-

Mitsubishi Pajero 3H
km. 208.500, árg. sep. 1986
Sýnaður 07'01 45.000,-

OG FLEIRI AÐRAR BRÚKTAR BILAR SO HYGG INN Á GÓLVIÐ OG FÁ EITT GOTT TILBOÐ

Vælkomin til

CITROËN Mercedes-Benz MITSUBISHI

Ivan Johansen Bilar

www.ivan.fo

Sosialurin - 311820